FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 4. september 2020
J. nr.: 20/00382
Viðgjørt: MM

Svar upp á fyrispurning nr. 9/2020 eftir tingskipanini § 52a

Fyrispurningur frá Aksel V. Johannesen, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um byrgingina um Haraldssund

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera ábøtur á byrgingina um Haraldssund?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at brúka grót frá tunlunum Norður um Fjall til byrgingina um Haraldssund?

Svar:

Verkætlanin um byrgingina um Haraldssund verður viðgjørd í sambandi við langtíðarløguætlan landsstýrisins. Landsverk hevur lýst verkætlanina í samferðsluætlanini 2018-2030 við myndum, sum kann síggjast her. Har er tilmælt, at hon verður framd í 2027. Politisk støða er ikki tikið til hetta enn.

Verkætlanin fyri byrgingina um Haraldssund fevnir um ein veg við tveimum sporum og eina gongu/súkklubreyt. Harafturat verða gøtuljós sett upp, og verjugrótið á norðaru síðu verður hækkað við umleið 1 metri, fyri at verja ímóti sjóroki.

Vegurin verður lagdur soleiðis, at hann verður ein natúrligur partur av vegunum báðumegin byrgingina. Vegurin á byrgingini fer at liggja sum ein bogi, ið bindir vegirnar á báðum síðum saman. Verkætlanin verður mett at kosta uml. 32 mió. kr.

Landsverk mælir til, at aldu simuleringar verða gjørdar áðrenn fari verður undir verkætlanina fyri at tryggja, at byrgingin er nóg høg.

Kanningar vísa, at tað ikki er neyðugt at brúka tunnilsgrót til verandi verkætlan, tí alt tilfarið í verandi byrging verður eyndurnýtt til nýggju byrgingina. Sambært verkætlanini er einans tørvur á heilt stórum dekkgróti, sum er tað uttasta lagið á byrgingini, sum verjur ímóti sjónum. Dekkgrót fæst ikki úr tunnilsgerð, men skal spreingjast úr einum grótbrotið.

Vísir tað seg at verða ein fyrimunur at hækka/breiðka byrgingina meira enn fyrst ætlað, kann grót úr tunlunum Norður um Fjall brúkast til hetta.

Tinganes, 4. september 2020

Jørgen Niclasen

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

landsstýrismaður í fíggjarmálum